# 875.000 tunnur av føroyskari olju




*Her í írska havinum er tað, at Atlantic Petroleum ætlandi fer undir veruliga oljuframleiðslu um eitt ár*

*Mynd: www. petroelum.fo*

**Somikið stórur er parturin hjá Atlantic Petroleum í loyvinum við West-Lennox og Crosby. Fyrstu dropparnir verða væntandi tiknir upp um eitt ár**

OLJUFELAG
*Jákup Mørk*

Beint eftir døgurað týsdagin kundi Atlantic Petroleum boða frá, at felagið nú hevur keypt ein fjórðing av oljufeltinum við West-Lennox og Crosby.

Talan er um eitt fund, sum til samans verður mett at innihalda 3,5 mió tunnur av olju, og er parturin hjá AP soleiðis 875.000 tunnur.

Gongst eftir ætlan, so verður farið undir at bora metingarbrunn í oktober mánaði, og skuldi fyrsta oljan væntandi verði fingin til høldar í triðja ársfjórðingini komandi ár.

Samlaða íløgan hjá Atlantic Petroleum í hesum er á leið 15 mió kr., og í tíðindaskrivinum verður boðað frá, at hetta er í góðum samsvari við menningarætlan felagsins annars.

– Keypið av rættindunum við West Lennox er í tráð við felagsins strategi, har vit vilja fáast við leiting, menning og framleiðslu av oljufeltum. Tað merkir eisini, at fyrsta oljan hjá felagnum nú er komin enn nærri. Hartli víðkar hetta um netverk okkara av strategiskum samstarvsfeløgum, soleiðiðs at felagið á tann hátt fær enn fleiri royndir í menning av smærri oljufeltum, sigur Wilhelm Petersen, stjóri í felagnum.

Saman við Atlantic Petroleum eru tað ensku Challenger Minerals, DYAS og First Oil EXPRO, sum hava rættindini til feltið. Ætlandi skal framleiðslan skipast soleiðis, at ein ein minni boripallur verður tengdur at stóra Lennox-platforminum, soleiðis at undirstøðikervið, sum hesin longu hevur, kann nýtast, tá oljan skal flytast til lands. Endalig avgerð um hetta verður tó ikki tikin, fyrr enn metingarbrunnurin er boraður.

# Nú verður aftur handlað

Eftir ein at kalla hálvdeyðan juli mánaða, hevur nakað av handli verið við partabrøvunum hjá Atlantic Petroleum seinastu vikuna.

Tikið verður ofta til, at tað ringasta, sum kann henda fyri eina skrásetta fyritøku er, um eingin handil er við partabrøvunum hjá felagnum, og eitt skifti tóktist tað, sum skuldi hendan lagnan raka føroyska oljufelagið.

Miðskeiðis í juli mánaði var als ikki handlað við partabrøvunum, og tó at kursurin soleiðis varð verandi á 289,5, so er ein slík støða ikki nøktandi hjá einum felagi.




*kelda: www.vmf.fo/www.icex.is*

Seinastu vikurnar hevur tó verið nakað av gongd í handlinum. Spakuliga er kursurin eisini kvinkaður nakað uppeftir, og endaði marknaðurin mánakvøldið á 308.

Soleiðis gongur kurvan við virðinum á partabrøvunum nú spakuliga rætta vegin, og so er spurningurin, hvørt tíðindini um keypið av loyvinum við West-Lennox og Crosby fer at økja um áhugan.

Á talvuni sæst, hvussu kursurin á partabrøvunum hjá Atlantic hevur flutt seg, síðani felagið varð skrásett. Strikan sýnir kursin, meðan stabbarnir, sum eisini eru á myndini, sýna, hvussu stórur samlaði handilin við partabrøvum felagsins hevur verið einstøku dagarnar.

**-jm**

## Virkisbyrjan á Baltikum

**Menningarstovan skipar komandi mikudag fyri kunnandi fundi um stovnan av vinnuligum virksemi í Baltisku londunum**

VIRKISMENNING
*Jákup Mørk*

Í samband við at Menningarstovan fyrireikar eina handilsferð til Estland í november 2005, verður skipað fyri kunnandi fundi um, hvussu føroyskar fyritøkur kunnu víðka um sítt altjóða virksemi við m.a. at stovna virki í Baltisku londunum ella at fáa sær samstarvsfelagar í hesum øki.

Ib Sönnerstad og Jørgen Meier Sørensen frá Nopef greiða frá, hvussu Nopef ráðgevur og stuðlar norðurlendskum (eisini føroyskum) fyritøkum, tá virksemi skal takast upp í Baltisku londunum.

Nopef er fyri tað mesta partin fíggjað av Norðurlendska Ráðharraráðnum (Nordic Council of Ministers).

Eyðfinnur Jacobsen frá Faroe Law greiðir frá, hvussu Faroe Law kann ráðgeva og hjálpa við stovnan av fyritøku í Baltisku londunum.

Fundurin verður á Parnassinum á Hotel Hafnia klokkan 9

## Gott fyrra hálvár hjá Trygd

**P/F Trygd hevur latið hálvársroknskapin úr hondum. Hesin sýnir eitt yvirskot á 3 mió kr.**

TRYGGING
*Jákup Mørk*

Av hesum stavar 1 mió kr. frá beinleiðis tryggingarvirksemi, og er tað nakað minni enn í fyrra hálvári í fjør. Í tíðindaskrivi verður sagt, at hetta er orsakað av harðari kapping á marknaðinum og øktu tryggingarendurgjøldunum til bilskaðar. Hinar 2 mió kr. stava frá avkasti av fíggjarognum.

Fyrra hálvár í fjør var samlaða úrslitið á leið hitt sama, men tá stavaði størri partur av yvirskotinum frá tryggingartekniskum virksemi.

Yvir høvur vuksu tryggingarútgjøldini nakað fyrra hálvár. Somuleiðis eru rakstrarútreiðslurnar hjá felagnum øktar, men hetta er tó sambært felagnum partur av eini heildarætlan, sum skal skapa grundarlag fyri framhaldandi vøkstri.

Felagið fegnast annars um økta marknaðarpartin, sum tey hava vunnið sær, men sagt verður einki um, hvussu stórur samlaði marknaðarparturin nú er.

## Skúlagarður og útiumhvørvi á temadegi

Tann 1. september skipar Synergi fyri temadegi, har fokus serliga verður sett á skúlagarðin og útiumhvørvið á skúlum.

Í tíðindaskrivi verður sagt, at tey á Synergi hava skilt, at útiumhvørvið á skúlum er eitt evni, sum alt fleiri kommunur og skúlar hava nomið við seinastu tíðina.

Tí er hesin temadagurin settur á skránna, og royndin í hesum verður at skapa eina størri felags fatan fyri, hví eitt lokkandi útiumhvørvi er týdningarmikið, og hvussu eitt slíkt verður skapt.

Við støði í framløgum hjá bæði føroyskum og útlendskum fyrilestrarhaldaranum verður hugt nærri at, hvørjar royndir grannalond okkara hava á økinum, og síðani verður roynt at finna fram til, júst hvussu føroyski tørvurin er á økinum, og hvussu hesin kann nøktast.

Talan er um ein almennan temadag, men málbólkurin er serliga skúlastjórar og -stýrislimir, lærarar, húsavørðar, arkitektar og ráðog sniðgevar annars.

Meira kann annars lesast um temadagin á www.synergi.fo.

**-jm**